e-mail: jakup@sosialurin.fo

# ítróttur

Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

**Støðan, 1. deild kvinnur**

| | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Stjørnan | 3 | 3 - 0 - 0 | 369 | 284 | 85 | 15 |
| 2 VÍF | 4 | 2 - 0 - 2 | 356 | 319 | 37 | 11 |
| 3 Neistin | 3 | 3 - 0 - 0 | 278 | 266 | 12 | 11 |
| 4 Kyndil | 3 | 1 - 0 - 2 | 308 | 274 | 34 | 9 |
| 5 VB | 3 | 1 - 0 - 2 | 324 | 333 | -9 | 6 |
| 6 Tjaldur | 4 | 0 - 0 - 4 | 247 | 406 | -159 | 0 |

# Eingin tekur Stjørnuna

*Tað eydnaðist ikki klaksvíkingum eisini at fáa hendur á hondbóltsgreipuni. Eftir sigurin á Kyndli týskvøldið hava kvinnurnar hjá Stjørnuni tó mest sum tryggjað sær, at meistaraheitið eftir øllum at døma endar har norðuri*



*Tað var einamest í verjupartinum, at Jastrid Gullaksen gjørdi vart við seg týsdagin, men hon var kortini eisini javnan gestur framman fyri kyndilsmálið*

***Mynd: Álvur Haraldsen***

JÁKUP MØRK

Kyndil-Stjørnan 18-25 (8-15)

Hetta varð triðja ferðin innan góðar tvær vikur at føroyameistararnir frá seinasta kappingarárið skuldu hitta stjørnuliðið, sum hevur ligið á odda meginpartin av inniverandi kappingarárið.

Teir báðir seinastu dystirnir vórðu heldur óvæntað endaðir við sigri til havnarliðið, og spurningurin var tískil, um tað skuldi eydnast Kyndli at endurtaka bragdið.

Sum úrslitið vísir, so eydnaðist tað ikki, og hetta vóru tað fleiri orsøkir til.

### Marita mundi gjørt tað aftur

Tað var nevnliga rættuliga skjótt greitt, at klaksvíksgenturnar høvdu als ongar ætlanir um at leggja seg niður fyri mótstøðuliðnum.

Fyrsti parturin av fyrra hálvleikinum var tó rættuliga javnur. Marita Hermansen byrjaði har hon slepti í seinasta dystinum, og millum annað tók hon tvey brotskøst. Hetta helt Kyndilsliðnum inni í dystinum, men tað var rættuliga sjónligt, at leikliga hevði Stjørnan greiða yvirvág.

Tað vísti seg eisini, at tá Simona Hansen endiliga fekk stillað kanónina inn, var lítið at gera hjá Maritu. Skotini sótu knallhart og dygst úti við, so eingin møguleiki var at verja fyri. Tað skal tó viðmerkjast, at tað tykist løgið, at ein somikið skotsterkur leikari sum Simona skal fáa somikið av plássið. Tað var sum hevði Kyndilsverjan einki móttrekk, tá hon kom inn móti verjuna fyri at royna seg.

Seinastu 10 minuttirnar av hesum hálvleikinum setti Stjørnan rættuliga ferð á, og tá heimaliðið longu hevði nýtt sítt time-out, fekk Bárður lítið og einki gjørt fyri at venda gongdini. Hesa løtuna broyttist støðan eisini munandi, tá Stjørnan fór frá 8-6 til 15-8.

### Brendu ov nógv

Tá farið var út til seinna hálvleik, hevði Bárður tó fingið høvið at tosa við genturnar, og brádliga fór kyndilsliðið at nærkast Stjørnuni.

Leikararnir á útiliðnum tóktust heldur ikki at orka eins væl og tær á heimaliðnum, og brádliga fóru tær at fremja tekniskar villur í hópatal. Bóltar vórðu mistir, uttan at leikarar vóru undir trýstið, og fleiri ferðir fóru kyndilskvinnurnar stormandi í mótálop, uttan at klaksvíksgenturnar megnaðu at fylgja við, ella ikki vóru komnar í nóg góða verjustøðu.

Tað kom tó at kosta dýrt, at havnarliðið ikki megnaði at fáa mál í øllum hesum skjótálopum. Fleiri ferð brendu tær, tá tær vóru í fríari skotstøðu. Serliga vóru tað vengirnir, sum sviku hendan dagin, tí tað hendi meira enn tí einu ferðina, at klaksvíksgentur ikki høvdu fingið stundir at skipa seg í verjupartinum, og vengurnar vórðu leiktar fríar til skot.

Kyndil royndi seg við fýra ymsum leikarum á veinginum henda dagin, og meðan Rakul einans fekk eitt mál, fingu Semona, Palma og Frida ongantíð bóltin í netið. Hetta hóast tær høvdu nógvar møguleikar til tess.

Heldur ikki hevði Jensia nakran góðan dag inni á strikuni, har hon heldur einki mál fekk.

Hetta skal tó ikki skiljast soleiðis, at talan bert var um vánalig avrik frá omanfyri nevndu leikarum, tí Johanna stóð ein góðan dyst í stjørnumálinum, men ofta var talan eisini um vánaligar skotroyndir, sum gjørdu uppgávuna hjá henni óneyðuga lætta.

Tað sigur eisini nakað um avrikið hjá heimaliðnum, at bert fýra leikarar myndaðu málskjúttaralistan hendan dagin. Satt at siga vóru tað bert Jórun, Lotte og Ann, sum veruliga megnaðu at hótta, og fyri hesar var tað eisini stórur smeitur, at eingin Beinta Sørensen var at loysa tær av, so tær kundu hvíla seg eina løtu á beinkinum.

Móti endanum av dystinum orkaðu kyndilskvinnurnar ikki longur at halda leikferðini uppi. Royndin at taka Stjørnuna aftur hevði kostað ov nógv, og tá tapið var í eygsjón, fullu tær fullkomuliga í fátt.

Seinastu løtuna av dystinum skeyt Stjørnan fimm mál, meðan Kyndil bert fekk tað eina, og tískil gjørdist endaligi sigurin kanska nakað størri, enn lagt varð upp til.

### Ikki meistarar enn

Eftir dystin fegnaðust klaksvíksgenturnar so ein skuldi trúð, at tær longu høvdu tryggjað sær FM-heitið. Matematiskt er hetta ikki vist enn, men sum úrslitini hava lagað seg, dugi eg illa at síggja, hvør skal leggja fót fyri Stjørnuni. Einasti møguleikin er helst, at tær ikki taka seinastu dystirnar í nóg stórum álvara, men hesin møguleikin tykist tó nakað fjarður.

Neistin er helst tað av hinum liðunum, sum á pappírinum hevur besta møguleikan at vinna Stjørnuna aftur. Avrikini hjá eldra havnarliðnum hava tó verið ov misjøvn ígjøgnum árið, og enn væntar teimum eisini at hitta Stjørnuna í endaspælinum.

Tann leikarin, sum mest av øllum skaraði framúr henda dagin, var helst Simona Hansen, men kortini skerst ikki burtur, at hinir leikararnir eisini stóðu seg væl. Vesna og Andrijana vildu styrkt um eitt hvørt lið í landinum, Jastrid Gullaksen stóð seg sera væl í verjupartinum, og soleiðis kundi skrivingin hildið á.

Tað skerst tó ikki burtur, at høvdu tær á heimaliðnum kent sína vitjunartíð, kudni tær gjørt uppgávuna hjá klaksvíksgentunum nakað væl torførari. Soleiðis skuldi tó ikki vera, og tá Marita ikki kundi bjarga Kyndli enn eina ferð, var talan helst um rætta vinnaran týskvøldið og helst eisini fyri kappingarárið.

### Dysturin í tølum

**Málskjúttar:**
Kyndil: Lotte Sørensen 8 (4), Jórun Ludvig 6, Ann Hansen 3, Rakul Joensen 1
Stjørnan: Simona Hansen 7, Vesna Tomajek 5 (2), Annika Ljósstein 4, Andrijana Milodanovic 3, Joan M. Joensen 2, Jastrid Gullaksen 2, Anna K. Samson 2
**Brotskøst:**
Kyndil 4, Stjørnan 4
**Útvísingar:**
Kyndil 1, Stjørnan 2
**Dómarar úr StÍF:**
Poli Hansen og Alexandur Johansen

# VÍF og ikki StÍF

*Rættleiðing til týsdagsblaðið*

JÁKUP MØRK

Í týsdagsblaðnum varð í dystarfrásøgnini fyri dystin millum H71 og Kyndil skrivað, at dómararnir, sum vóru settir at døma, ikki møttu til dystin.

Víðari stóð at lesa, at strandingar vóru settir at døma, men onkursvegna vóru boðini ikki komin fram.

Hesar upplýsingar høvdu vit fingið frá dómaranevndini hjá HSF, men hetta er ikki heilt rætt.

Tað var nevnliga VÍF, sum var setta at døma dystin.

Eftir tí, sum vit hava frætt, vóru boðini um dómaramanningina til dystin latin frá HSF, og tískil liggur ábyrgdin fyri mistakið hjá vestmenningum, sum eftir øllum at døma hava yvirsæð henda part av skránni.

Hetta broytir tó ikki við tann veruleika, at eitt slíkt mistak er átaluvert, hóast tú ongantíð kanst verja teg fult og fast fyri slíkum mistøkum. Vónandi slepst undan slíkum tilburðum framyvir, tí hetta tænir í øllum førum ikki hondbóltinum her á landi.

Vit biðja strandingar orsakað okkum mistakið, og vóna at teir bera yvir við okkum í hesum føri.




## Avloysarastarv á Ferðaráð Føroya

Ferðaráðið sóknast eftir einum avloysara í sambandi við barnsburðarfarloyvi. Starvstíðin verður frá 15. mai 2000 og fram til 30. oktober 2000.

Arbeiðið er innan økið innlendis menning, og fevnir um samskifti og samstarv við økisferðavinnufeløgini og projektir so sum betran av infrastrukturi og fasilitetum.

Arbeiðið er lagt til rættis av starvsfólkinum, sum fer í farloyvi, og avloysarin hevur síðani sjálv/ur ábyrgd av, at ætlanir og budget halda. Avloysarin refererar til stjóran.

Vit vænta, at avloysarin hevur hesar kvalifikatiónir:

- Royndir frá líknandi starvi við projektleiðslu, útbúgving innan ferðavinnu ella frá hægri lærustovni
- Holla vitan um Føroyar og føroysk viðurskifti sum heild og sum ferðamannaland, herundir vitan um flutnings-, gistingar- og útferðarmøguleikar.
- Kunnleika til og um aktørar innan vinnuna
- Hollan kunnleika til edv og mál.

Nevnda starv verður lønt sambært sáttmála millum Føroya Landsstýri og Starvsmannafelagið/viðkomandi yrkisfelag.

Skrivlig umsókn skal vera Ferðaráðnum í hendi í seinasta lagi 29. februar 2000.

**Ferðaráð Føroya**
Postsmoga 118
FO-110 Tórshavn

## Advokatfelagið

Yviri við Strond 4 • Boks 359 • FO-110 Tórshavn
Tlf. 311260 • Fax 311261
Telefontíð: $9^{30}$ – $12^{00}$ og $13^{00}$ – $16^{00}$

Tórmóður Djurhuus, adv. Dánjal Magnussen,adv.
Jógvan Páll Lassen, adv. Petur Even Djurhuus, adv.
Jógvan E. Ellefsen, adv. Anna Dam, adv.
Ingi Højgaard, adv.

## Proklama

Sambært aðalfundarsamtykt tann 28. januar ár 2000 í P/f Vestland, 900 Vágur, har avgjørt varð, at umskipa felagið til smápartafelag, umframt samstundis at lækka partapening/innskotspening felagsins við kr. 920.000,00 í samband við útgjalding til partaeigararnar, verða kravánarar felagsins sambært § 46 í partafelagslógini bidnir um innan 3 mánaðir frá dagfesting av hesi lýsing at fráboða møgulig krøv saman við prógvskjølum fyri hesum til Advokatfelagið, Yviri við Strond 4, 100 Tórshavn, att. Petur Even Djurhuus, advokatur.

Tórshavn, tann 31.01.2000

## Skip til sølu

| | |
|---|---|
| **Slag av skipi:** | Frystilínubátur |
| **Bygdur/umbygd./ longdur:** | 1977-1979-1985-Noregi (sandblástur 1994) |
| **Klassi:** | Norska Skipaeftirlitið |
| **Stødd:** | 37,98x7,53x4,50 m |
| **Høvuðsmaskina:** | Caterpillar 867 HK, 3508 (frá 1994) |
| **Hj. maskinarí:** | 2 x Scania (ávíkavist frá 1996 & 1998) |
| **Lastarúmd:** | 320 cbm |
| **Egningar-maskina:** | Mustad - (frá 1996) - 38.000 húkar |
| **Frystiorka:** | 2 x plátufrystarir - 11 tons/24 tímar |
| **El- & Nav. tól:** | Brúgvin er væl útgjørd við øllum nútímans hentleikum og flestu tólini eru frá 90'ti árunum. Annars er skipið í góðum standi. |
| **Prísur:** | 14,5 mió. NOK. |

— — — — — — — — — — —

| | |
|---|---|
| **Slag av skipi:** | Bulkbátur/sjálvlossari |
| **Bygdur/ umbygdur:** | 1973/1987/1996/1998, Týsklandi |
| **BT/NT** | 712/264 |
| **Klassi:** | Norska Skipaeftirlitið klassaður 8/1999 - nýggjan tanktop (18 mm) |
| **Stødd:** | 49,59 x 10,12 x 5,13 m (við farmi) |
| **Lastarúmd:** | 1000 cbm/TDW. umleið 1250/1300 |
| **Høvuðsmaskina:** | Caterpillar 3512TA - 1250 HK (frá 1998) |
| **Síðuskrúu:** | Brunvoll, 250 HK |
| **Gravimaskinan:** | Åkerman H14B (frá 1993) - skuffan 2,5 cbm |
| **Prísur:** | Reiðaríið biður um besta boð. – Skipið sigst vera í sera góðum standi. |

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til:

TOR SHIPPING

Niels Finsensgøta 23 • Box 1252 • FO-110 Tórshavn
Tlf. 31 85 31 • Fax 31 93 69
E-mail torship@post.olivant.fo

## Advokatfelagið

Yviri við Strond 4 • Boks 359 • FO-110 Tórshavn
Tlf. 311260 • Fax 311261
Telefontíð: $9^{30}$ – $12^{00}$ og $13^{00}$ – $16^{00}$

Tórmóður Djurhuus, adv. Dánjal Magnussen,adv.
Jógvan Páll Lassen, adv. Petur Even Djurhuus, adv.
Jógvan E. Ellefsen, adv. Anna Dam, adv.
Ingi Højgaard, adv.

## Akfar til sølu

Vegna konkursbúgv verður akfari Renault Scenic 1,6 árg. 1999 við hesum lýst til sølu.

Akfarið kann síggjast eftir nærri avtalu, og verða áhugaði biðin um at venda sær til

**Petur Even Djurhuus, kurator**
Yviri við Strond 4, 100 Tórshavn
Tlf. 31 12 60

Í samband við søluna tilskilar búgvið sær rætt til frítt at velja millum innkomin tilboð, herundir at vraka øll.

## Lærlingur søkist

Søkt verður eftir lærlingi til Eykalutagoymslu okkara – at byrja sum skjótast.

Ert tú ágrýtin, nærlagdur/løgd og hevur hug at nema lærdóm í spennandi umhvørvi og í áhugaverdari vinnu við nógvum møguleikum – so send okkum skrivliga umsókn helst ídag.

Partur av útbúgvingini fer fram á donskum skúla, og krevst tískil FHS prógv.

Merk brævbjálvan: **Goymslulærlingur**

**P/F WENZEL**
Box 3043 • 110 Tórshavn
Tlf. 313873 • www.wenzel.fo

## Reyði krossur Føroya

Sorgarlinjan hjá Reyða Krossi Føroya svarar allar dagar frá kl. $17^{00}$ til $23^{00}$

212380

## Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúli

**Nýggj skeið – tilmelding tlf. 31 77 55**

**Skreytskrift (kalligrafi)**
byrjar mánadagin 7. februar.

**Byrjanarskeið**
Lærari Jens Guðmundsson
**Framhaldsskeið**
Lærari Jens Guðmundsson

**Datalæra**
Mánakvøld og hóskvøld kl. 18.30-20.00
Lærari Páll Poulsen

## GRAV-STEINAR



Sera bíligir gravsteinar kunnu fáast við at venda sær til:

**Tlf. 371345**
ella **371687**

**Skála Handverkarafelag**

## Ársaðalfundur

Ársaðalfundur Skála Handverkarafelags verður fríggjadagin 18.2.2000. Tíð og stað verður lýst seinni.

Skrá sambært lógum felagsins.

Allir limir eiga at møta.

**Nevndin**

*Lýsið í* **sosialinum**